# Íslendskur guitarleikari fær høvuðpínu

**Komandi vikuskifti fær Headache Blues Treo vitjan av kenda íslendska guitarleikaranum Guðmundur S. Petursson, og fara teir 24. og 25. oktober at spæla á Vertshúsinum í Havn.**

TÓNLEIKUR
*tíðindaskriv*

Sjálvt um Guðmundur spælir so at siga øll tónleikasløg, hevur hann í nógv ár verið mettur at vera fremsti bluesleikarin í Íslandi, og hann hevur 3 ferðirnar vunni sær heiður sum ársins guitarleikari í Íslandi: Hann var eisini kosin "Undiscovered Guitarhero" í Guitar International í 1991.

Fyriuttan at hava spælt við flestu íslendsku tónlistafólkum og hava verið við á einum havi av fløgum, hevur Guðmundur eisini arbeitt við Chicago-bluesnøvnum, sum t.d. Pinetop Perkins, Jimmy Dawkins, Billy Boy Arnold, Detra Farr and Chicago Beau og hevur við hesum bæði spælt inn og turnera á festivalum, so sum Chicago Blues festival, Rocce Rossa á Sardigna og South by South-West in Austin, Texas.

Fyriuttan alt hetta hevur Guðmundur S. Petursson eisini lisið klassiskt guitarspæl, er fastur tá Sinfonihljómsveit Íslands hevur brúk fyri guitaristi, og hevur havt solo-framførslur við t.d. Reykjavik Chamber Orchestra.

Headache Blues Treo eru: Uni R. Debess, guitar og sang, Edvard Nyholm Debess, bass og sang, og Rógvi á Rógvu, trummur.

– Orsøkin til at teir taka stig til hetta tiltak er at fáa sær sjálvum tónleikarligan íblástur, og at geva áhoyrarunum eitt gott upplivilsi, siga teir í Headache.

Framførslurnar verða á Vertshúsinum fríggjakvøld 24.10 kl.23.00 og Leygarkvøld 25.10 kl.23.00.















*Mynd: Alan Brockie*

# Føroyskir sjónleikarar trampa

*Føroyskir sjónleikarar rópa og trampa illa*
*Hans Tórgarð hvørki rópar ella trampar*
*Ergo er hann ikki ein føroyskur sjónleikari*

UMMÆLI
*Rúnar Reistrup*

Í grundini eru fáir føroyskir sjónleikarar við í nýggjasta leikinum hjá Grímu sambært hesi rangstøddu Erasmus Montanus syllogismuni. Deiliga fáir.

Tað byrjar annars sum vanligt. Ein hálvgum geylandi konufólkarødd sker seg inn millum ryggjargeislarnar og ovurhonds trampandi føtur koma sum tvær stórutrummur tvassandi framvið.

Álvaratos hugsar man. Hetta hølið er so lítið og intimt, at eg síggi hvørt eygnahár hjá leikarunum flyta seg. Hvat skal so øll hendan rópan og trampan til. Vit sita jú ikki aftast í Sjónleikarhúsinum við bygningsfeili og tungum oyrum. Vit eru beint her.

Men tíbetur linka rópini og trampini skjótt og falla í eina normala desibel- og richterlegu. Róligari og meira fíntfølandi mekanismur taka yvir. Eygnabrá og teskan, tá tað hóskar seg. Andlitsbrá og vanlig tala, tá tað hóskar seg, og stórar rørslur og rópan, tá tað skal til. Leikurin byrjar at harmonera og dregur teg inn og nøkur hundrað ár aftur, til tá jørðin var fløt, og sjónleikur æt komedia á føroyskum.

Grímutulkanin av Erasmus Montanus rakar har hon skal. Flestu leikararnir passa sín leiklut sum fótur í hosu, og tað ikki heilt lætta málið flýtur fyri tað mesta út úr vælvandu tungunum í einum óforðaðum streymi.

Komedian sleppur at liva sítt egna lív inni í einari sirkusmanegu sum nú og tá og partvís allatíðina fremur eina ytru ávirkan á leikgongdina.

Erasmus Montanus kann sum leikur kanska tykjast hava mist sín aktualitet, nú upplýsningstíðin er væl yvirstaðin, fólk ikki longur ivast í, hvørt jørðin er fløt ella ei og annars hava sunna skepsis yvirfyri dekni og allari yvirvøld.

Men av ymsum orsøkum tykist føroyska fyrningarfreistin fyri hesari komediu at liggja langt frammi í framtíðini. Tann komiskt yvirlegni keypmannahavnarastudenturin verður støðugt endurføddur í føroyskum líki ár eftir ár, og hinumegin lærdu gjónna stendur trúðarbundna fornoktanin av betrivitan sterk enn sum áður. Fyri tað kundi leikurin verið skrivaður í Havn anno 2003. Tey flestu kenna seg tískil helst raktan her ella har av Holberg og Johannessen, um tey velja at seta seg sjálvan út fyri hesum upplyftandi fragdi av einari komediu.

**Leikurin Erasmus Montanus eftir Ludvig Holberg hevði premieru á Meiarínum 18. oktober.**